# Bæði stjórin og stýrið í SEV fáa kanska sekkin

**Hurlivasin um gegnistrupulleikan hjá stjóranum í SEV í sambandi við Vágatunnilin hevur nú eisini breitt seg til stýrið fyri SEV, og nú skal umboðsnevndin taka støðu til framtíðina hjá bæði stjóra og stýri**

GEGNISTRUPULLEIKAR
*Áki Bertholdsen*



*– Hetta er so álvarsligt, at tað kann enda við, at Umboðsnevnin samtykkir eitt misálit á SEV-stýrið, og so má tað leggja frá sær. Hann útihýsir heldur ikki, at sjálvur stjórin kann rúka*

– Sera álvarsligt.

So stutt lýsir Hans Tausen Olsen gongdina í SEV hendan seinasta mánaðin.

Hans Tausen Olsen er formaður í umboðsnevndini hjá SEV, sum er hægsti myndugleiki hjá elfelagnum.

Og tað, sum hann sipar til er tvístøðan, sum Klæmint Weihe er í við tað, at hann bæði er stjóri í SEV og formaður í nevndini fyri Vágatunnilin.

Hendan tvístøðan gjørdi, at Klæmint Weihe var ógegnigur, tá ið SEV viðgjørdi mál, um høvdu við Vágatunnilin at gera.

– Tað ber ikki, at Klæmint Weihe kann sita øðrumegin borðið sum formaður fyri Vágatunnilin og søkja SEV um eitthvørt og at síðani setir seg hinumegin borðið sum SEV stjóri at viðgera umsóknina.

Hendan tvístøðan førdi til, at málið varð tikið upp í stýrinum fyri SEV og tað endaði við, at Klæmint Weihe miðskeiðis í november fekk eina átalu, umframt at hann skuldi taka seg úr nevndini fyri Norðoyatunnilin.

Samstundis skuldi hann ikki taka lut í málsviðgerðum í SEV, sum høvdu við Vágatunnilin at gera. Hesar málsviðgerðir skuldi deildarleiðarin á innleggingardeildini, hava.

Harafturat skuldi stýrið endurskoða innanhýsis mannagongdirnar í SEV.

– Klæmint at Weihe helt, at Vágatunnilin og Norðoyatunnilin hingu so neyvt saman, at hann spurdi um hann kundi bíða við at taka seg úr Norðoyatunlinum til Vágatunnilin varð tikin í nýtslu, og hesum játtaði stýrið honum.

Hans Tausen Olsen sigur, at hetta var ein munnlig avtala.

Men hann sigur, at hóast SEV-stjórin fekk átalu, og hóast hann ikki skuldi vera við í málsviðgerðini hjá SEV í sambandi við Vágatunnilin, er onki broytt.

– Vágatunnilin varð tikin í nýtslu 10. desember, og Klæmint Weihe er ikki farin úr Norðoyatunlinum enn!

– Og Klæmint Weihe tekur enn lut í málsviðgerðum í SEV, sum hava við Vágatunnilin at gera. Men tað, sum er ógvuliga álvarsamt, er, at stýrið góðtekur tað, hóast sama stýrið gav honum átalu í november.

Sjónvarpið tók málið upp, og Hans Tausen Olsen er eitt sindur argur um, at Klæmint Weihe bæði í Útvarpinum á nýggjárinum og í bløðunum nú um dagarnar hevur gjørt tað til, at tað er eitt persónligt álop á seg frá umboðsnevndarformanninum.

– Fyri so vítt er tað persónligt, tí tað slepst ikki undan. Tað er ikki stjórastarvið í SEV, sum er ógegnigt, Tað er Klæmint Weihe, sum situr í stjórastarvinum, sum er ógegnigur, tí hann er eisini formaður fyri Vágatunlinum. Men tað er ikki persónurin Klæmint Weihe, sum er áhugaverdur.

Tað, sum Hans Tausen sipar til, er, at 17. januar í ár hevur SEV-stýrið eitt mál viðvíkjandi Vágatunlinum til viðgerðar.

Á tí fundinum er eisini Klæmint Weihe sum umboð fyri SEV, men hann tekur lut í orðaskiftinum um Vágatunnilin, hóast hann er ógegnigur.

Hetta hevur fingið tann eina stýrislimin, Dia Poulsen av Nesi í Vági at klaga stýrið fyri Umboðsnevndini við kravi um, at avgerðin í stýrinum verður ógildað.

Umframt at klaga um ógegnið hjá stjóranum sigur Dia Poulsen, at málið var ikki á skránni til hendan stýrisfundin, og uppskotið var heldur ikki sent stýrislimunum undan fundinum. Hann sigur eisini, at stýrið hevur heldur ikki havt høvi til at viðgera eina frágreiðing og eitt tilmæli frá deildarleiðaranum á innleggingardeildini, hóast hetta júst hevði við umrødda mál at gera.

Á stýrisfundinum gjørdi Dia Poulsen vart við, at hann kundi ikki taka undir við uppskotinum, tí tað átti at kannast nærri, kanska við løgfrøðiligari hjálp.

– Eg meti hetta mál so álvarsligt at umboðsnevndin eigur at taka upp hesa kæru og ógilda avgerðina, sigur Dia Poulsen.

### Umboðsnevndin kallað saman

Hans Tausen Olsen sigur, at hann nú hevur kallað umboðsnevndina saman, og hon fer at viðgera málið 17. februar.

Sjálvur metir hann málið sera álvarsligt bæði fyri stjóran og fyri stýrið, í nú er tað ikki nóg mikið við tí, at stjórin heldur fram við sínum ógegniga virksemi, men nú er tað enntá við vælsignilsi frá stýrinum, hóast stýrið hevur samtykt, at hann er ógegnigur.

– Men tað tykist ikki, sum um at stjórin vil góðtaka, at hann er ógegnigur, tí hann hevur verið við í at viðgera mál í SEV, sum hevur við Vágatunnilin at gera, eisini eftir at hann formliga hevur fingið fráboðan um, at hann er ógegnigur.

Eitt nú hevur hann, eftir at hann fekk átalu, tikið deildarleiðaran á innleggingardeildini av ræði í sambandi við el-innleggingar í Vágatunnilin.

Samstundis hevur stýrisformaðurin hildið frágreiðingina og tilmælið frá deildarleiðaranum um hetta sama mál loyniligt fyri hinum stýrislimunum á fundinum 17. januar, eins og Dia Poulsen ger vart við.

Hvat niðurstøðan hjá umboðsnevndini verður, er ilt at spáa um, men Hans Tausen Olsen útihýsir ikki, at tað kann enda við, at bæði stjóri og stýrið fáa sekkin frá umboðsnevndini, so álvarsligt heldur hann at málið er.

– Ein avleiðing kann vera, at umboðsnevndin samtykkir eitt misálit á stýrið, og so má tað leggja frá sær.

Hans Tausen Olsen sigur, at umboðsnevndin kann ikki lata tað fara aftur við borðinum at stýrið tilætlað heldur eitt tilmæli frá einum deildarleiðara loyniligt, serliga tá ið stýrið sjálvt hevur samtykt, at sami deildarleiðari at vera málsviðgerari í samband við Vágatunnilin. Tað kann geva mistanka um ósakliga viðgerð í stýrinum, og sostatt hevur umboðsnevndin skyldu at taka málið upp, sigur Hans Tausen Olsen.





*Eldrasambýlið Korndalsbýlið á Eiði, mitt í myndini, verður útbygt við 40 prosentum av verandi búrúmum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Byggja eldrasambýlið út

**Eldrasambýlið á Eiði, Korndalsbýlið, verður víðkað við fýra búplássum umframt rúmi til ítriv og annað**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

Eiði: Økt verður um búplássini í eldrasambýllinum Korndalsbýlinum á Eiði. Fýra búrúm verða innrættað í kjllaranum umframt rúm til ítriv og viðgerð.

Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, sigur, at peningur er settur av til arbeiðið, og at byrjað verður í heyst. Samlaði kostanður verður væntandi um eina millión krónur, og gjørt er av at gera arbeiðið yvir tvey fíggarár, soleiðis at helvtin verður goldin í ár, og restin næsta ár.

Eiðis Kommuna, sum eigur Korndalsbýlið, hevur søkt Almannamálaráðið um stuðul til útbyggingina. Stuðulin, søkjast kann um, er kr. 50.000- fyri hvørt plássið. Enn hevur kommunan ikki fingið svar upp á umsóknina, sigur borgarstjórin á Eiði.

Tordur Niclasen sigur, at tað, sum talan er um at gera, er at innrætta kjall-aran í Korndalsbýlinum soleiðis, at fýra búpláss koma aftur at teimum tíggju, sum frammanundan eru í húsinum. Eisini verður innrættað rúm til ergoterapi, ítriv og tílíkt, sum búfólkini kunnu brúka dagin til.

Borgarstjórin sigur, at í mun til verandi rúm verða hesi seinnu innrættað tað øðrvísi, at wc og bað eru til hvørt rúmið sær.

– Vit hava lært av upprunaligu byggingini, at tað áttu vit eisini at havt gjørt tá, sigur hann.

Korndalsbýlið er fyrst og fremst ætlað eiðisfólki, sigur Tordur Niclasen. Men tað hava fólk aðrastðani frá eisini búð har. Til dømis fólk úr grannakommununum, eins og fólk úr bygdum norðantil á Streymoynni, vísir hann á. Og tað hevur riggað væl.

Fólkini gjalda sjálv ein part av kostnaðinum fyri at búgva í Korndalsbýlinum, meðan tær kommunur, sum tey, ið ikki eru av Eiði, eru úr, hava goldið kommunupartin. Og alt hevur gingið upp á stás, sigur Tordur Niclasen.

Hann væntar ikki, at nakað av rúmunum fer at standa tómt. Til tess er eftirspurningurin ov stórur, og parturin av eldri fólki í mun til samlaða fólkatalið veksur bara, vísir hann á.

Korndalsbýlið hevur onkuntíð verð nevnt sum eitt dømi um, at tað ber til at byggja bíliga í slíkum førum, og so verður samanborið við eitt nú ellis- og røktarheimini. Men tað er ikki heilt rætt at gera tað, sigur Tordur Niclasen. Tí hesi húsini hava í grundini hvørt sína uppgávu. Ellis- og røktaheimini hava búfólk, sum ikki altíð eru sjálvhjálpin, meðan tey á eldrasambýlunum eru tað, og tí ikki hava somu umstøður fyri neyðini, sum tey á røktarheimunum hava, vísir hann á.

# Stjórin hevur onga viðmerking

**Stjórin á SEV, Klæmint Weihe, hevur onga viðmerking til, at umboðsráðið er kallað saman**

SEV-MÁLIÐ

SEV stjórin hevur onga viðmerking til, at umboðsráðið er kallað saman at viðgera støðu hansara sum formaður í P/F Norðoyatunlinum. Hann sigur við Sosialin, at hann metir tað rætt einki at siga um málið,



til tað er avgreitt á umboðsnevndarfundinum, sum verður.

Eisini var ætlan okkara at fáa eina viðmerking frá formanninum fyri SEV stýrinum, Poul Arna Jacobsen, til tað, Hans Tausen Olsen, umboðsnevdarformaður, sigur, um at stýrisformaðurin hevur hildið eina frágreiðing loyniliga. Men stýrisformaðurin var ikki at hitta fyri evstamark fyrrapartin í gjár.

**ej**

